

# 19. TÓRSHAVNAR JAZZ FÓLKA OG BLUES FESTIVAL

## Skrá

**Týsdagur 2. juli**

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Norðlýsið* | 13.00-18.00 | Conserto Grotto v/ Benjamin Koppel | kr. 350 |
| *Gongugøtan FK* | 15.00-16.00 | Down to Earth (Irish-UK) | free-ókeyp. |
| *Gongugøtan Vaglið* | 16.00-17.00 | Søren Søgaard blues, solo | free-ókeyp. |
| *Listaskálin* | 19:30-21:00 | Rigmor Gustafsson (SE) m. Ravnsbøll trio | kr. 80 |
| *Festival i Havnar Klubbi* | 21.00-23.30 | Benjamin Koppel Kvartet | free-ókeyp. |
| *Kaggin* | 21.30-24.00 | Søren Søgaard blues, solo | free-ókeyp. |

**Mikudagur 3. juli**

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Gongugøtan F.K.* | 15.00-16.00 | Tre på Spil | free-ókeyp. |
| *Gongugøtan Vaglið* | 16.00-17.00 | Fyris Jazz Band (SE) | free-ókeyp. |
| *SMS Pallurin* | 16.30-17.00 | Tre på Spil | free-ókeyp. |
| *N. H Konserthøllin* | 17:00-18:30 | Stig Rossen Ensemble | kr. 200 |
| *N. H Konserthøllin* | 19:30-20:00 | Fyris Jazz Band (SE) | |
| | 20:00-21:30 | Stig Rossen Ensemble | kr. 200 |
| *Kaggin* | 21.30-24.00 | Søren Søgaard blues, solo | free-ókeyp. |
| *Á gamla Meiarínum* | 21:30-23:00 | Benjamin Koppel Kvartet | kr. 60 |

**Hósdagur 4. juli**

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Norðlýsið* | 13.00-18.00 | Conserto Grotto v/ Deborah Herbert (US) | kr. 350 |
| *Gongugøtan F.K.* | 15.00-16.00 | Fyris Jazz Band (SE) | free-ókeyp. |
| *SMS Pallurin* | 16.30-17.00 | The Jew Brothers Band (New Zealand) | free-ókeyp. |
| *Gongugøtan Vaglið* | 16.00-17.00 | Tre på Spil | free-ókeyp. |
| *Listaskálin* | 19:30-21:00 | Irina Strange (Rusland) with her Swingband | kr. 80 |
| *Á gamla Meiarínum* | 21:30-23:00 | Unn Patursson Band & Ravnating | kr. 60 |
| *Kaggin* | 21.30-24.00 | The Jew Brothers Band (New Zealand) | free-ókeyp. |
| *PLATFORM* | 21.30-24.00 | Wentus Blues Band (FIN) | kr. 50 |

**Fríggjadagur 5. juli**

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Norðlýsið* | 13.00-18.00 | Conserto Grotto v/ A.Hagberg & J. Tchicai | kr. 350 |
| *Gongugøtan F.K.* | 15.00-16.00 | Ghana trommer og dans | free-ókeyp. |
| *Gongugøtan Vaglið* | 16.00-17.00 | Ghana trommer og dans | free-ókeyp. |
| *Listaskálin* | 19:30-21:00 | Deborah Herbert (US) m. Minor Brandur Band | kr. 80 |
| *Á gamla Meiarínum* | 21:30-23:00 | Malan Thomsen Kvartet & Lossingarmen | kr. 60 |
| *PLATFORM* | 22.00-04.00 | Blues Night: Teir & Wentus Blues Band (FIN) | kr.100 |
| | | Konufólk ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00 | |
| *Festival i Havnar Klubbi* | 23:00-03:00 | Fyris Jazz Band (SE) The Jew Brothers Band (New Zealand) Irina Strange (Rusland) with her Swingband | kr. 100 |

**Leygardagur 6. juli**

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Gongugøtan F.K.* | 11.30-12.30 | Down to Earth (Irish/UK) & Tre på Spil | free-ókeyp. |
| *Gongugøtan Vaglið* | 12.30-13.30 | Down to Earth (Irish/UK) & Tre pÂ Spil | free-ókeyp. |
| *Listaskálin* | 19:30-21:00 | Ygdrasil | kr. 80 |
| *Sjónleikarahúsið* | 20.00-22.00 | Ghana Trommer og Dans | kr. 60 |
| *Á gamla Meiarínum* | 21:30-23:00 | Deborah Herbert (US) m.Minor Brandur Band | kr. 60 |
| *Festival i Havnar Klubbi* | 23:00-03:00 | Ghana Trommer og Dans Unn Patursson Band Lossingarmen Irina Strange (Rusland) with her Swingband | kr. 100 |

**Sunnudagur 7. juli**

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Norðlýsið* | 13.00-18.00 | Conserto Grotto v/ A.Hagberg & J. Tchicai | kr. 350 |

**Atgongumerki kunnu keypast á Kunningarstovuni**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 408, P/F Restorff´s Bryggjarí, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 24.01.2002.
Nevnd:
Farin frá sum formaður: Mortan Mørk, Turidargøta 23, 100 Tórshavn.
Farin úr nevndini: Lena Mørk, 100 Tórshavn og Martin Mørk, Kongsgil 25, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Regin Vilhelm, Kongsgil 7, 100 Tórshavn (formaður), Jóhann Mortensen, Tórsteinsgøta 8, 100 Tórshavn (næstformaður), Eirikur Ó. Thorvaldsson, Rógvubøur, 350 Vestmanna, Óla Svenn Nolsøe, Blankagøta 11, 100 Tórshavn og Johan Mortensen, Spógvavegur 57, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Lena Mørk, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Óla Svenn Nolsøe, Blankagøta 11, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 17. juni 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2828, P/F Petur & Petur, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 06.06.2001
Nýtt navn: Sp/f Petur & Petur
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 06.06.2001 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 260.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Rói Egholm, Hagagøta 6, 160 Argir (formaður), Petur Slyne, Dalagøta 6, 100 Tórshavn og Petur Mohr Reinert Millum Gilja 179, 188 Hoyvík.
Stjórn:
Innkomin sum stjóri: Petur Mohr Reinert, Millum Gilja 179, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið av hvørjum stjóra sær.

Skráseting Føroya tann 19. juni 2002

Kristin Balle

# Lærarar til Viðareiðis skúla

**Søkt verður eftir 3 lærarum til Viðareiðis skúla skúlaárið 2002/03.**

- Viðareiðis skúli er ein nýmótans og vælhildin skúli. Skúlin hevur fimleikarhøll, teldur, egið bókasavn, køk, hondarbeiði, smíð, alis- og evnafrøði stovur.
- Skúlin liggur í sera ríkum natúrumhvørvi tætt við haga, berg, hellu og møl.
- Í skúlanum ganga 54 næmingar frá 1. til 7. flokk. 6 lærarar starvast á skúlanum.

**Vit søknast eftir trimum starvsfelagum, sum hava hug og hegni til:**

- at samstarva við hinar lærarnar á skúlanum og foreldur
- at vera við til, at menna skúlan og geva íblástur
- at hava positivan hugburð og opið sinni
- at síggja møguleikar framum forðingar
- at vera menniskjaligur

**Vit kunnu bjóða eitt skúlaumhvørvi:**

- har tú hevur ávirkan og ábyrgd
- kann royna teg og nýta skapandi evnir
- har nýhugsan og íverksetan eru vælkomin

**Størvini:**

- 1 lærari í tíðaravmarkað starv alt skúlaárið 2002/03 við fullum tímatali
- 1 lærari til uml. 14 tímar um vikuna alt skúlaárið 2002/03
- 1 lærari fyri lærara í barsilsfarloyvi. Frá 1. august til 17. desember 2002. (Møguleiki verður óivað fyri, at halda á fram eftir setta tíðarskeiðið).

Størvini vera sett eftir sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Mentamálastýrið.

**Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til fyrstalæraran:** Heidi Vágsá á tlf. skúlin 451180 ella á tlf. heima 455688.

**Umsóknir og møgulig viðmæli skulu sendast til:**

**Viðareiðis skúlastýri**
v/ Lenu Heinsen
FO-750 Viðareiði.

**Umsóknarfreist:** Týsdagin 9. juli.

# Norðskála/Oyrar skúli

Søkt verður eftir 4 lærarum skúlaárið 2002/2003 fyri lærarar, sum hava farloyvi.

3 av størvunum eru fulltíðarstørv og 1 til 18 t/v. Størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2002/2003, og verða lønt eftir sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Nærri fæst at vita hjá skúlaleiðaranum tlf. 422245 ella 422208.

Umsóknir, við møguligum prógvum og viðmælum, skulu vera Skúlastýrinum í Sunda kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. juni 2002.

**Skúlastýrið í Sunda kommunu**
v/ Nomi Jacobsen
450 Norðskáli



# UPP & AFTUR-LATINGARTÍÐIR

**Svimjihøllin verður opin allan dagin í summarfrítíðini,** undantikið mikudag og sunnudag, frá mánad. 24/6-2002 til leygard. 10/8-2002



**Tíðirnar eru hesar:**

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Týsdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Mikudag | kl. 06:45 - 09:00 |
| Hósdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Fríggjadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Leygardag | kl. 09:00 - 17:00 |
| Sunnudag | kl. 08:00 - 10:00 |
| & | kl. 14:00 - 17:00 |

**SVIMJIHØLLIN Í GUNDADALI**
Hoydalsvegur 21 • Tel 311550



# Kamar ella íbúð søkist

Til eitt av starvsfólkum okkara søkja vit hervið eftir einum kamari ella eini íbúð skjótast tilber.

Vinarliga setið tykkum í samband við okkum sum skjótast.

demich **Tlf. 21 10 71**




# Der er brug for dig

**Tag sygeplejeuddannelsen i Thisted**

Der er brug for sygeplejersker overalt på kloden.

Det kan blive dig, der med en uddannelse som sygeplejerske, får billet til utallige jobmuligheder.

Du kan vælge, om du vil arbejde på sygehus, blandt ældre, med børn, socialt udstødte, i verdens brændpunkter, eller du vil forske.

Gør som andre færøske unge før dig: Rejs til Danmark og få din internationalt anerkendte uddannelse på Sygeplejeskolen i Viborg Amt, afdeling Thisted. Vi har rige erfaringer med at have nordiske studerende og har et fintmasket internationalt samarbejde, der kommer dig til gode.

Studiemiljøet er ungt og imødekommende. Vi har stærke og kvalificerede lærerkræfter, og vi giver dig en solid ballast – både teoretisk, praktisk og inden for IT - til dit virke i fremtiden blandt mennesker, der har brug for dig, og det du kan.

**Studiestart:**
1. september og 1. februar – ansøgningsfrist til start i september er 1. juli 2002. Kontakt os, så sender vi et ansøgningsskema straks!

**Spørg løs:**
Ring til vores studievejledere Tlf. 0045 9791 1688 og kig ind på vores hjemmeside: www.vibamt.dk/sygeplejeskole

Ring gerne til en af vore tidligere studerende: Elken Bech, FO 950 Porkeri, Tlf. +298 374 075, eller e-post: edbech@post.olivant

Underviser Hanna Vejhøj, kan kontaktes tirsdag 25 juni kl 10 – 13 for at aftale en personlig samtale på Færøerne : tlf: + 45 51 78 93 74.

Til handilin við Landavegin verður søkt eftir fyrikomandi og kvikari

# krambakvinnu

til skiftandi vaktir. Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Annbritt.

**HJÁ GUNLEiVI**

Tlf. 22 51 60 ella 31 21 61

Til pakkideildina verður søkt eftir røskum

# pakkifólki

at arbeiða aðruhvørja viku.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja ella støkka inn á gólvið og spyrja eftir Bent.

**HJÁ GUNLEiVI**

Tlf. 22 23 25 ella 31 21 61

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Leiðari til Býlingshúsið undir Brúnni

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir leiðara til Býlingshúsið undir Brúnni 40 tímar um vikuna at byrja 1. august 2002.

**Stovnslýsing**
Í Býlingshúsinum undir Brúnni ganga 47 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við ávikavist 20 og 17 børnum og einari vøggustovu við 10 børnum.

**Vit bjóða**

- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum
- tær møguleikan at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit ynskja at tú**

- ert útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir (er fyrimunur)
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum býlingshúsi
- saman við starvsfólkunum ert við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag merktan av virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara, og Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Setanarviðurskifti og løn**
Sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 1. juli 2002

SNARSKIVAN

# Frá Runavíkar Skúlastýri

Søkt verður eftir 2 sáttmálasettum lærarum tíðaravmarkað til skúlaárið 2002/03.

Størvini eru fulla tíð og eru lønt samb. sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Mentamálastýrið.

Onnur tímatalvan inniheldur m.a.: enskt 5. og 7. fl., hondarbeiði og gentuítrótt. Hin tímatalvan inniheldur m.a.: rokning við 1. og 5. fl. og gentuítrótt í 7. fl.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. juni.

**f. Runavíkar Skúlastýri**
Meinhard Bjartalíð, tlf. 448308
Bøgøta 3
627 Lambi

**Internet Sosialurin**
www.sosialurin.fo